# Ætlar at møta betur upp

**- Eg eri púra paff, sigur Sjúrður Skaale, ið sum tingmaður hesa tingsetuna hevur havt størstu fráveruna. Hann heldur seg ikki hava forsømt løgtingsarbeiðið, men ætlar sær hereftir at møta betur upp í tinginum**



Randi Jacobsen

Løgtingsmaðurin Sjúrður Skaale var málleysur, tá ið hann í morgun fekk at vita frá Sosialinum, at hann er tann tinglimur, sum oftast hevur verið burturi frá tingfundum. Av 46 tingfundum hesa tingsetuna hevur hann ikki verið á ellivu fundum. Tað gevur 23,9 prosent fráveru.

Hann noyddist at hugsa væl og leingi, áðrenn hann kundi svara, hvussu tað hekk saman.

- Tað hevur verið alment frammi, at eg var ein túr í New York, og seint í summar var eg nakrar dagar uttanlands við familjuni, sigur Sjúrður Skaale.

Tað kann vera, at fleiri fundir hava verið júst tá.

### Tingmaður burturav

Hetta kann tó ikki vera øll forkláringin, heldur Sjúrður Skaale, sum er tingmaður burturav. Hann hevur ikki sum summi onnur tingfólk nakað annað arbeiði við síðuna av, og hann heldur seg ikki á nakran hátt forsøma tingarbeiðið.

- Tá ið mál eru fyri, har eg eri framsøgumaður, eri eg altíð í tingsalinum, men eg má viðganga, at eg heilt ofta siti á skrivstovuni í tinghúsinum ella heima og arbeiði, tá ið tingfundur er. Tá ið eg siti á skrivstovuni, fái eg minst líka nógv við, sum tá ið eg siti í tingsalinum, sigur Sjúrður Skaale.

Hann ásannar, at tað ikki júst er nakar heiður at vera tinglimurin, sum hevur skulkað mest.

- Hatta má eg fara at rætta upp uppá.

| Flokkur | Frávera | % |
|---|---|---|
| Tjóðveldi | 48 | 13 |
| Fólkaflokkurin | 40 | 12,4 |
| Javnaðarflokkurin | 27 | 9,8 |
| Miðflokkurin | 11 | 8 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 7 | 7,6 |
| Sambandsflokkurin | 24 | 7,5 |

# Ein misvísandi uppgerð

**Tingfólk, sum ofta eru skrásett fyri ikki at verða møtt á tingfundunum, kunnu hava gjørt minst líka gott arbeiði sum hini, ið altíð eru á fundi, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsformaður**

Randi Jacobsen

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður ætlar sær einki at gera mótvegis teimum tingfólkum, sum hava havt stóra fráveru í løgtinginum. Tingfólk hava ikki møtiskyldu og skulu bara standa til svars fyri sínum veljarum, sigur hann.

Hann heldur tað ikki vra beint at gera upp, hvussu tingfólk hava skulkað.

- Handan uppgerðin er ógvuliga misvísandi, tí uppgerðin sigur einki um, hvussu nógv tingfólkini arbeiða. Tingfólk, sum ofta eru skrásett fyri ikki at verða møtt, kunnu hava gjørt minst líka gott arbeiði, sum altíð eru á fundi, sigur Hergeir Nielsen.

Tann uppgerðin er ógjørlig at gera.

### Umberingar

Hann skilir væl, at tingfólk ikki møta, tá ið tingið viðger mál, sum tey einki hava við at gera.

Hann umber annars tingfólk, sum búgva í útjaðaranum, at tey stundum ikki møta, tí skulu tey persónlig ørindi heima sum til dømis til tannlækna ella at fylgja, hava tey ongan livandi møguleika at sleppa til Havnar tann dagin.

Henda umberingin hjá løgtingsformanninum hevur tó ikki so stóran týdning, tí tey, sum skulka mest, búgva í Havn ella nærindis. Tey kunnu annars leypa inn á gólvið í tinginum, verða skrásett og so fara avstað aftur.

### Fylgja við kortini

Mangan er tingsalurin mestsum fólkatómur men tað merkir ikki, at tingfólk ikki fylgja við orðaskiftinum.

- Hátalarar eru á øllum skrivstovunum, so tingfólkini kunnu hoyra orðaskifti. Mangan fylgja tey væl betur við, tá ið tey sita á skrivstovuni og lurta, enn tá ið tey sita í salinum, sigur Hergeri Nielsen.

Hann hevur ikki varnast, at nøkur ávís tingfólk luttaka minni í tingarbeiðinum enn onnur.

# Andstøða og samgonga mótrokna atkvøður

**Seinastu tíðina er tað hent fleiri ferðir, at tingfólk í samgonguni hava avtalað við tingfólk í andstøðuni um ikki at atkvøða, tá ið annað teirra er burturstatt. Hetta nevnist at cleara. Avtalan er ikki skipað, og løgtingsformaðurin verður ongantíð kunnaður**

Randi Jacobsen

Í Fólkatinginum hevur tað í fleiri ár verið vanligt, at tingfólk í einum valbólki avtalað við eitt tingfólk úr einum øðrum valbólki um ikki at atkvøða í ávísum málum. Tað verður gjørt vegna sjúku, ella tí eitt tingfólk er bururstadd. Ráðharrarnir luttaka eisini í clearingini, tí teir eru limir í Fólkatinginum.

- I Fólkatinginum tó skrivari mín sær av tí og boðaði skrivaranum í tingbólkinum frá, sigur Lisbeth L. Petersen, fyrrverandi fólkatingslimur.

Í Løgtinginum eru summi tingfólk eisini farin at cleara.

### Bjørt og Sjúrður clearaðu

Løgtingsfólkini Sjúrður Skaale og Bjørt Samuelsen fingu fleiri skolur fyri, at tey vóru og runnu marathon í New York og ikki fingu varafólk inn fyri seg.

Heimafturkomin varðu tey seg í lesarabrævi við, at tey høvdu gjørt avtalu við samgongulimir um at cleara.

Í brævinum stóð m.a.:

- Annars er vanligt, at samgonga og andstøða gera avtalur um "clearing" t.e. at andstøðan letur eina atkvøðu færri, um ein samgongulimur ikki fær verið á fundi - og øvut.

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður sigur seg hava hoyrt um, at tingfólk í eina ið í nøkrum førum hava clearað.

- Men tað hevur einki við løgtingsformannin at gera. Eg verði ikki kunnaður og havi einki við tað at gera. Tingfólk gera avtalurnar sínamillum, sigur Hergeir Nielsen.

Hann heldur, at tá ið hann sær eitt tingfólk sita í tingsalinum og ikki atkvøða, gitir hann, at viðkomandi hevur gjørt avtalu um ikki at atkvøða. Tey verða skrásett fyri ikki at hava atkvøtt.

Eg havi ongantíð hoyrt um, at tingfólk hava clearingskipanir, so tey kunnu mótrokna stemmur frá hinum partinum, eins og vanligt er í fólkatinginum.

Men sambært lesarabrævi frá Sjúrði Skaale og Bjørt Sameulsen eftir marathonrenningina í New York, er eftir øllum at døma okkurt um tað. Kanst tú spyrja tingformannin um tað?